

# Árið var 007

**NÝGGJÁRSHUGLEIÐINGAR**
*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*

Árið hjá James Bond – 007 – fer nú at halla. Og vit eru sanniliga "Shaken" og "Stirred", aftaná hetta árið. Kanska serliga av tí djúpt borandi politikkinum í Løgtinginum, har tey einastu bleytu virðini tykjast at verða sofurnar og stólarnir í Løgtingshúsinum. Væntast kann, at komandi valstríð verður rættuliga útHOLað. Føroyskur politikkur er vorðin ein ostur. Luktar einki serliga væl, og fullur av holum.

Vit gjørdust eitt valdømi í 2007, men eru framvegis eitt eindømi tá kemur til væntandi langtíðar ætlanir. 2015 nærkast!

Sandoyingar kenna á sær, at stjórin í Kall hevur gjørt teimum eina "Bjarna"tænastu. So Kall selur neyvan nógv talutíðarkort í Sandoynni, í 2008.

Kvinnur hava fylt nógv í 2007. Kanska nóg nógv til, at tær fara at síggjast betri í politiska landslagnum, aftaná løgtingsvalið 19. januar í 2008. Um vit síggja burtur frá teimum politiskt stabilu kandidatunum hjá Tjóðveldi, Annitu á Fríðriksmørk og Heidi Petersen, so koma vit ikki uttan um, at hini markantu kvinnuligu valevnini hava upplivað eitt ella fleiri floksskifti. Kitty May Ellefsen dámar væl svenska 70-ára bólkin ABBA. Og sami bólkur kann sigast at verða ímyndin av politisku gongdini. Har hon er farin frá A og yvir til B, og so aftur frá B, og yvir til A. Sagt í stuttum: "ABBA".

Anni vildi ikki taka HÆDD fyri skemtitekningini hjá Óla P, sjálvt um fólk í øllum flokkum meinti, at tekningin av Kitty May sat væl.

Kitty May vil heldur hava longri flogvøll, enn KAJ sum formann!

Sambandsflokkurin hevur so ikki rópt: "Kitty Mayday Mayday".

Men Sambandsflokkurin hevur havt nøkur floksskifti til sín fyrimun. Fyrst er tað Ingvør Nolsøe, sum hevur tann fyrimun fram um nógv onnur valevni, at hon kann seta tey røttu "lýsingar"orðini á sín politikk, og veit hvussu ein reklamerar fyri sær sjálvari. Men tað er kent millum manna, at hon var limur í Tjóðveldi, líka til heystið 2007. Men so meistaraliga lýsti hon í bløðunum longu lívsferðina hjá sær aftur til Sambandsflokkin, at ein má lesa Peer Gynt hjá Ibsen, fyri at kunna lesa nakað líknandi. Vitnisburðurin um heimkomina til Sambandsflokkin í bløðunum, minti sára nógv um heimkomina hjá Peer Gynt, tá hann aftur møtti sínari elskaðu Solveig.

Og so er tað Sæunn Ó. Hansen í Saltangará, sum ikki vildi verða næstovast á "Bill"board í Eysturoynni. Hon fann sær eitt annað "Mið". Tvær fyri eina er ikki so galið hjá Sambandsflokkinum. Teimum tørvar so ikki at tosa um niðurskurð á hesum økinum.

Og so er tað Sjálvstýrisflokkurin, sum er vorðin "Rúna"bundin. Rúna Sivertsen tímdi ikki at verða í Mannfólkaflokkinum meir.

Benito Mussolini royndi at rætta Skeiva Tornið í Pisa, tá hann ráddi fyri borgum – eisini tornum – í Italia. Svakt? Jú víst so, men hann gjørdi so okkurt við tað. Tað kann ein so ikki siga um PISA-kanningina í Føroyum. Gongdin er skeivari enn tornið í Pisa. Men "Alle gange tre", sum tað eitur á hinum móðirmálinum, sum enn er partur av frálæruni í Fólkaskúlanum. "Tredje gang er Lykkens Gang" sigur móðirfólkið eisini. Kanska øll í undirvísingarkervinum ganga við røttum ryggi í 2009.

Hjá fótbóltslandsliðnum verður "33. gang" vónandi "Lykkens Gang!". Tað einasta vit vita fyri vist fer at henda í 2009, er at KÍ vinnur bæði Løgmanssteypið og Føroyameistaraheitið! Tað stendur í "Bláu Bók"!

# Nýggjársheilsanir



*Bringing the glove to Gota was one of the highlights of the doctor's 2007. Here's to a great festival, a wonderful crowd and some of the coolest tunnels around. Make sure G keeps rocking y'all, it's the great hope of the North Atlantic.*
*Skál!*
**Dr Spock**

*Dear Faroeseans! I wish you the very best year of 2008. I finally live in stockholm after some years of rootlessness, and i get the opportunity to meet your fellow Teitur Lassen every now and then. Wish you all the best.*
**Emil, Loney Dear**

**Hail Tróndur & Sosialurin readers,**

*a less hostile- rather friendly greeting from your brothers in the rainy, windy west!!! we finally laid down our guns when we saw how nice you were to us haha.. the fishing trip was a blast. 28 coalfish/haddocks baded in Champagne, fur and the most majestic and flattering of God's beautiful kingdom you borrowed us for a second.. crystal clear perfectionism! WOW. hope you fellow rats on the boat liked the fish. the cooking captain was great too! the Föroya Bjór did not hurt either. Jón, our host Susanne, Petur & lovely bandmates, Bogi and the patient couple who took us fishing.. you all made us remember this as one of the very brightest highlights and most relaxing ones for us as a band.. ever! what else cann we say.. thank you!!!*
**S-M**



*Kære færinger.*
*Jeg har haft den store fornøjelse at besøge jer 2 gange i det nu næsten forgangne år, 2007. Først var det som underholdning/prisoverrækker til Planet Awards. Det var en stor ære for mig at få lov til at overrække en pris.*
*Theis, Peter, Thomas, min far og jeg blev modtaget på Færøerne med åbne arme, og havde 4 fantastiske dage med masser af oplevelser. Ikke mindst var det en oplevelse at spille for et veloplagt publikum som sang helt fantastisk!! Nogle måneder efter var vi så heldige, at være et af navnene på Sommerfestivalen i Klaksvig. Denne gang med hele bandet. Det var en lang og hård tur op til jer, men endnu en gang mødte vi en masse fantastiske mennesker og smukke omgivelser. Desværre ville vejrguderne, at vi kun skulle nå at spille 5 sange inden vi måtte evakueres. Meget ærgerligt, men jeg krydser fingre for at det bare betyder, at vi må tilbage igen til sommer og gøre koncerten færdig... Den tur tror jeg aldrig vi glemmer, specielt ikke byturen i Torshavn efter koncerten... Jeg vil gerne sig jer tak for modtagelsen. Ikke mindst af mig/os, men også af min musik. Tak for alle jeres positive kommentarer og tilbagemeldinger på mine 2 albums Confessional og Good News. Jeg ønsker for jer alle et lyst og lykkeligt nytår. Endnu et år fyldt med musik, glæde, venskab, kærlighed og forståelse.*
*De kærligste hilsener fra København,*
**Bryan Rice**
*www.bryanrice.com*
*www.myspace.com/bryanricemusic*